Kunngerð frá

útskiftingarnevndini fyri Strendur

Útskiftingarfundur verður **mikudagin 15. apríl 2015 kl. 19.00** í bygdahúsinum.



Fyribilsplanur, sum er uppskot til nýggja skipan av jørðini, verður lagdur fram. Eisini verður lagt fram yvirlit yvir lendið, ið ætlandi verður ognartikið til almenn endamál í sambandi við útskiftingina.

Petur Nielsen, útsk. form.

Umhvørvisstovan, Traðagøta 38
Postboks 2048, 165 Argir, tel 342400
us@us.fo · www.us.fo

Almannaverkið søkir starvsfólk

Almannaverkið søkir sosialráðgeva til Trivnaðardepilin - eind 10

Í Trivnaðardeplinum - eind 10 - er eitt fast starv sum sosialráðgevi fulla tíð leyst at søkja. Starvið verður sett frá 1. mai 2015. Arbeiðstíðirnar eru frá kl 08.00 til 16.00 gerandisdagar, tó kunnu broytingar koma fyri, um tørvur er á tí.

Setanarstaðið er Almannaverkið við tænastu í løtuni Trivnaðardeplinum - Eind 10.

Starvið er flokkað í 6. lønarflokki í sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **22.04.2015 kl 12.**

Sí lýsingina á heimasíðu okkara:
av.fo>Leys størv

Fuglafjarðar Kommuna

Frítíðarskúlin "Kambur", søkir eftir 4 fólkum

Kambur er stovnur, ið veitir heildagstilboð til 6 ára gomul børn og frítíðarskúlabørn.

Vit hava brúk fyri tykkum.

Vit sóknast eftir fólki, ið hevur dirvið at seta dagsskránna, bæði fyri tey 6 ára gomlu og frítíðarskúlabørnini. Vit vænta tí at tit kunnu arbeiða sjálvstøðugt, eru ja-lig/, duga at samstarva, taka ábyrgd og duga at seta tykkum mál.

Vit bjóða eitt spennandi starv, ið støðugt er í menning, har tú kanst verða við at mynda og seta tín dám á stovnin. "Kambur" liggur í einum náttúruríkum umhvørvi, har ið náttúran náttúrliga setur sín dám á gerandisdagin.

Setanarviðurskifti
1. Starvið er 35 tímar um vikuna, at byrja 1. Mei 2015 til 1.februar í 2016, fyri hjálparfólk í barnsburðarfarloyvi
2. Starvið er 35 tímar um vikuna, at byrja 15. August 2015 til 1. Juli í 2016 fyri námsfrøðing í barnsburðarfarloyvi
3. Starvið er 35 tímar um vikuna, at byrja 15. August 2015 ætlað námsfrøðingi
4. Starvið er 30 tímar um vikuna, at byrja 15. August 2015 ætlað námsfrøðingi

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Arbeiðstíð, mánadag til fríggjadag 07.15 – 17.00.

Um eingin námsfrøðingur søkir verður hjálparfólk sett fyribils í tíðaravmarkað starv.

Skrivlig umsókn skal verða Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 24. apríl 2015 kl. 12**. Eisini ber til at senda teldupost til info@fuglafjordur.fo.

Fuglafjarðar kommuna
Ennivegur 38
Fo-530 Fuglafjørður

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Bjørghild Arnholdtsdóttir, leiðari, telefon 238092.

Almannaverkið søkir starvsfólk

Almannaverkið søkir námsfrøðing og summarfrítíðaravloysarar til Trivnaðardepilin - Eind 1 - borgarar við autismu v.m. í Norðoyggjum og Eysturoy

Í Trivnaðardeplinum eind 1 eitt starv sum námsfrøðingur fulla arbeiðstíð í sambýlinum Kelduskákið í Klaksvík leyst at søkja. Arbeiðstíðirnar fevna um alt samdøgrið, dag-, kvøld- og náttarvaktir.

Somuleiðis verður søkt eftir summarfrítíðaravloysarum til sambýlið á Mýruvegi, sambýlið Kelduskákið, sambýlið á Líknargøtu og toymið hjá rørðslutarnaðum manni. Arbeiðstíðirnar fevna um alt samdøgrið, dag-, kvøld- og náttarvaktir.

Setanarstaðið er Almannaverkið við tænastu í løtuni Trivnaðardeplinum Eind 1.

Setanar- og lønartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, Heilsurøktarafelagið og Heilsuhjálparafelag Føroya.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **21.04.2015 kl 12.**

Sí lýsingina á heimasíðu okkara:
av.fo>Leys størv

LÆRARAR TIL FISKIVINNUSKÚLAN

Fiskivinnuskúlin søkir lærarar at byrja á skúlanum 1. august 2015 í hesum lærugreinum:

Alisfrøði C- og B-stig (3+5 t/v)
Enskum B- og A-stig (7,5+5 t/v)
Evnafrøði B-stig (7,5 t/v)
Ítrótti og Heilsu C-stig (3 t/v)
Lívfrøði B- og A-stig (7,5+5 t/v)
Miðlakunnleika C-stig (3 t/v)
Samfelagsfrøði C-stig (3 t/v)
Samskiftistøkni C-stig (3 t/v)
Støddfrøði B- og A-stig (10+5 t/v)
Søgu C-stig (3 t/v)
Tilfeingisfrøði B-stig (12,5 t/v) og Tilfeingi A-stig (10 t/v)

Alt eftir lærugreinasamanseting kann talan verða um tímalærarar, kvotasett ella møguligt fast starv.

Umsóknarfreistin er fríggjadagin 17. apríl 2015 kl. 12.

Starvslýsingin sæst á heimasíðu skúlans: www.fiskvest.fo

FISKIVINNUSKÚLIN
Tilfeingisskúlin